# Lættari hjá føroyingum at sleppa á sjúkrahús í Íslandi

**Føroyska-íslendska avtalan um heilsusamstarv hevur við sær, at lækni og sjúklingur nú kunnu velja, antin sjúklingurin skal fáa viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum í Danmark ella á Landspitalinum í Reykjavík**

Randi Jacobsen

Hóast nakrir sjúklingar seinastu árini eru sendir til Íslands at fáa viðgerð fyri sjúku, hevur eibki formligt samstarv verið. Neyðugt hevur verið at fáa visitasjónsnevndina í hvørjum einstøkum føri at geva grønt ljós.

Men nú ber til. Hósdagin varð avtalan um føroysktíslandskt heilsusamstarv undirskrivað, og haraftat er eisini avtala gjørd millum Landssjúkrahúsið og Landspitalið í Reykjavík um samstarv.

Rammuavtalan varð hósdagin í seinastu viku undirskrivað av íslendska heilsumálaráðharranum Álfheiður Ingadóttir og við Aksel Johannesen, landsstýrismanni í heilsumálum.

Henda avtala hevur verið leingi á veg. Í 2007 varð avtala undirskrivað millum londini um samstarv millum londini innan heilsuøkið. Nú er so komið á mál.

### Eitt tilboð aftrat

Tað ber bara til at senda sjúklingar úr Føroyum til tey sjúkrahúsini, sum avtala er við. Higartil hevur avtala bara verið við Ríkissjúkrahúsið í Danmark. Tó hava 12 føroyingar higartil í ár verið á Landspitalinum, umframt øll tey, sum ahva verið á privatum viðgerðarstovum, eitt nú fyri at fáa eygnaviðgerð.

Nú ber líka væl til at senda sjúklingar til Landspitalið sum á Ríkisjúkrahúsið, og læknar og sjúklingar hava fingið ein møguleika aftrat, sigur Aksel Johannesen, landsstýrismaður.

Tað verður ein meting í hvørjum einstøkum føri, hvagar sjúklingurin skal sendast. Ein avgerð sum sjúklingurin tekur í samráð við læknan. Mett verður um umstøðurnar, góðskuna, prís, og ikki minst bíðilista. Í fleiri førum er nógv skjótari at sleppa framat at fáa viðgerð á Landspitalinum enn á Ríkissjúkrahúsinum, og summar viðgerðir eru eisini væl bíligari í Íslandi, ikki minst nú íslendska krónan er so lág.

Landspitalið hevur gjørt ein útgreinaðan príslista fyri, hvat hvør viðgerð kostar. Ríkissjúkrahúsið roknar ikki út upp á sama máta, og tí er torført at siga fyri hvørja einstøka viðgerð, hvar hon kostar minni.

Allar viðgerðir, sum kunnu gerast í Føroyum, skulu framvegis gerast her, leggur Aksel Johannesen dent á.

### Góð úrslit

Báðir ráðharrarnir vísa á, at Ísland kann vísa á serliga góð úrslit, tá ið tað kemur til viðgerð fyri bróstkrabba, og til tær viðgerðirnar er eingin bíðilisti. Stráluviðgerð hevur Landspitalið kunnað givið í fleiri ár og hava drúgvar royndir í at skreena fyri krabba..



*Álfheiður Ingadóttir og Akasel Johannesen vístu á, at avtalan tænir báðum londum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nógv fólk hava eisini leitað sær til Íslands at fáa viðgerð fyri barnloysi, tí eisini á hesum økinum eru úrslitini góð.

### Meira arbeiði

Íslendski ráðharrin hevur ikki greitt svar uppá, hví úrslitini á summum økjum eru nógv betri enn í fleiri øðrum londum. Starvsfólkini eru útbúgvin bæði í Evropa og í USA.

Vit vilja fegin hava samstarv á so nógvum økjum sum gjørligt. Vit hava eitt gott sjúkrahús og væl útbúgvin starvsfólk, sigur Álfheiður Ingadóttir.

Eftir kreppuna vil Landspitalið gjarna hava meira arbeiði og nýta sjúkahúsið meira.

Vit bjóða tænastur til Føroyar, Grønlands og Noregs, og tað eru frysta flokstænastur, sum ikki eru dýrar. Starvsfólkini eru í so nógv í mun til arbeiðið á sjúkrahúsinum. Vit hava stórt arbeiðsloysi, sum ikki má vaksa, eisini á heilsuøkinum, og tí ræður um at útvegan teimum uppgávur, so vit varðveita hesi fólk, sigur íslendski heilsumálaráðharrin.

Á Landspitalinum arbeiða 4.500 fólk, og sjúkrahyúsið hevur sjúklingahotell, sum føroyskir sjúklingar kunnu gista á.

Íslendingar eru somuleiðis áhugaðir í at keypa heilivág úr Føroyum. Tí vitjaði ráðharrin við fylgi eisini Tjalddurs Apotek.

Higartil hevur hetta ikki borið til, tí Tjaldurs Apotek hevur ikki havt neyðugu góðkenningarnar og ei heldur framleiðslutólini til størri framleiðslu. Men nú er alt tað við at koma undir land.

Tit hava eitt apotek, sum vit kunnu øvunda tykkum. Tí kunnu vit íslendingar læra nógv av, sigur Álfheiður Ingadóttir.

# Esperanza var í Nuuk fríggjadagin

**Kristian Dahl, løgreglurmaður, skrivar úr Nuuk**

Umleið klokkan trý seinnapartin fríggjadagin stevndi Greenpeaceskipið Esperanza inn á vánna í Nuuk. Skipið kom ikki at bryggju, men legði seg út fyri gomlu havnina, Kolonihavnen, har tað lá til um áttatíðina um kvøldið. Lítil aktivitetur sást umborð á skipinum. Ein gummibátur frá skipinum sigldi tó runt á vánni og var eisini ein stuttan túr í landi, har hann tók nøkur fólk umborð. Hetta vóru eftir øllum at døma fólk frá Greenpeace, sum hóskvøldið høvdu skipað fyri einum borgarafundi í nordurlandahúsinum Katuaq í Nuuk.

Á borgarafundinum hóskvøldið kunnaði Greenpeace um vandarnar við oljuleiting og ymiskt annað í hesum sambandi. Einir 40 áhoyrarar vóru á fundinum. Ein bólkur á Facebook hevði lýst við mótmælisgongu at vera uttan fyri Katuaq, meðan borgarafundurin var. Fleiri enn 200 fólk møttu til mótmælisgonguna. Tey høvdu skeltir og bannarar vid tekstinum "Grennepeace go home" og tílíkt. Løgreglan var á staðnum og til reiðar, um ófriður skuldi taka seg upp. Mótmælisgongan var tó friðarlig, og tey gjørdu einki um seg annað enn at rópa rakstrarróp ímóti Greenpeace.

Skipið Esperanza fór avstað aftur úr Nuuk fríggjakvøldið um áttatíðina og stevndi eftir øllum at døma norður eftir. Hvar skipið ætlar sær, vil Greenpeace einki siga um.

